Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.



NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Læknaskrivarar í 40 ár



*Jórun Smith og Randi Eysturlíð hildu 40 ára starvsdagar sum læknaskrivarar á Landssjúkrahúsinum*

*Mynd: Jan Müller*

Fríggjadagin 3. oktober var móttøka á Landssjúkrahúsinum tá Jórun Smith og Randi Eysturlíð læknaskrivarar hildu sínar 40 ára starvsdagar saman.

Umleið hundrað fólk vóru komin saman og fleiri talur vórðu hildnar. Th. Michael Smith, Heðin Thomsen og Hans Chr. Clementsen frá tónleikabólkinum Ad-Libitum spældu.

Tey sum hildu taltur vóru: Jón á Steig, yvirlækni á medisinsku deild, Sæunn Hansen, formaður í Læknaskrivarafelag Føroya, Petur Ellefsen, læknastjóri, og Marita Arge Magnussen, fyrrverandi leiðandi laborantur á medisinsku deild.

Jón á Steig mintist tíðina fyrst í 60-unum á Landssjúkrahúsinum tá læknaskrivararnir vóru við til stovugongdirnar. Randi var skrivari hjá Bendt Jensen, fyrsta medisinska yvirlækna í Føroyum, frá tí at deildin var stovnað í 1960. Jórun var skrivari hjá Jógvan Róin til hann fór frá í 1994. Jón á Steig segði, at tær høvdu verið dugnaligar, tær byrjaðu við skrivibrettum og steniografi, síðan til tekstviðgerð og nú til nýggjastu elektronisku journalirnar, sum eru á veg.

Jórun Smith var fyrst skrivari hjá Eivind Rubek Nielsen yvirlækna á Suðuroyar Sjúkrahúsi frá 1959-60. Síðan hevur hon verið skrivari hjá Paula Dahl, Marner Simonsen, Essa Arge, Jógvan Róin, og barnalæknunum Oddmar Færø, Sepi Taheri og nú hjá Fróða Joensen.

Randi Eysturlíð var fyrst skrivari hjá Bendt Jensen, síðan hevur hon verið skrivari á medisinsku deild og á sjúkrasystraskúlanum.

Eisini hevði formaðurin í Læknaskrivarafelag Føroya, Sæunn Hansen, orðið. Hon vildi vegna læknaskrivararnar á medisinska deplinum ynskja Jórun og Randi tillukku við 40 ára starvsdøgunum. Hon helt at tær høvdu verið sera trúgvar í tænastu á Landssjúkrahúsinum.

Marita Arge Magnussen hugleiddi um hvussu tað var at arbeiða á Landssjúkrahúsinum. Í sama rúmi sum læknaskrivararnir sótu, blivu donorar tappaðir á eini gamlari divan vórðu hjartabíløt (EKG) tikin. Í stovuni við síðuna av áttu konurnar síni børn. Ongir




*Fyrrverandi og núverandi sjúkrahússtjórar hittast á móttøkuni*

*Mynd: Jan Müller*

*Fleiri kend andlit á Landssjúkrahúsinum seinastu mongu árini vóru við til móttøkuna*

*Mynd: Jan Müller*



parkeringstrupulleikar vóru í hospitalsgarðinum, tí bilurin hjá Maritu var einasti bilur sum stóð har.

Á samkomuni hendan dagin vóru fleiri fyrrverandi starvsfólk sum t.d. Sanna Dahl, fyrrverandi yvirlækni, Nathalia Tausen, fyrrverandi jarðarmóðir, Jenny Kragesten, fyrrverandi sjúkrasystir á føðideildini, Olina Niclasen, fyrrverandi leiðandi sjúkrasystir á barndeldini, Jana Niclasen, fyrrverandi deildarsjúkrasystir á B7, og Jógvan Róin og Óli Mikkelsen, fyrrverandi yvirlæknar.

# Fleiri vórðu heiðrað á Dimmalætting

Fríggjadagin 3. oktober var almenn móttøka á redaktiónini hjá Dimmalætting á Smyrilsvegi í sambandi við 25 ára starvsdagin hjá Pól á Kletti, sum byrjaði sum blaðmaður í Dimmalætting 1. oktober 1978.

Nógv fólk vóru komin at heilsa uppá Pól hendan dagin bæði vinir og kenningar og starvsfelagar frá øðrum fjølmiðlum. Talur vóru hildnar og gávur handaðar.

Pól hevur í mong ár havt ábyrgdina av vikuskiftisinnlegginumhjá Dimmalætting við nógvum áhugaverdum tilfari. Fyrst var tað Viðskerin, og seinni bleiv tað Skái.

Umframt Pól vóru tað fleiri onnur starvsfólk á blaðnum, sum vórðu heiðrað. Tað er soleiðis at á Dimmalætting eru tað nógv starvsfólk sum hava arbeitt bæði meira enn 30 og meira enn 40 ár. Hesi vórðu eisini heiðraði hendan dagin.

Í framtíðini verður skipað fyri móttøku fyri teimum, sum hava 25, 40 og 50 ára starvsdagar á blaðnum.



*Finnbogi Ísakson og Pól á Kletti*

*Mynd: Jan Müller*



*Øssur Winthereig, Helgi Jacobsen og Pól á Kletti*

*Mynd: Jan Müller*

## Dagurin

**8. oktober. Ingibjørg.** Helst gamla danska navnið Ingiburgh, men eingin veit hví tað er komið í álmanakkan.
Navnið er av norrønum uppruna, samansett av gudanavninum Ing og bjørg, ið kemur av sagnorðinum at *bjarga*.